# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



***26. august fingu Rakul S. Olsen og Kai Roest, Hvalba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4470 gr.***

5. september fingu Birna Heinesen, Rituvík, og Christian Høgni Jacobsen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3900 gr.

11. september fingu Siri og Dan Sjóstein, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3350 gr.

11. september fingu Ruth á Plógv, Sandavágur, og Petur N. Reinert, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

12. september fekk Bjørg Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3730 gr.

13. september fingu Eyðhild Jacobsen og Dánjal Olsen, Froðba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3250 gr.

14. september fingu Jóhanna Danielsen og Janus M. Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3150 gr.

14. september fingu Birita Nolsøe og Hjálmar Hátún, Velbastað, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4100 gr.

14. september fingu Una Hansen og Gunnar Isfeld, Argjum, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 4900 gr.

15. september fingu Evona og Arni Nielsen, Fámjin, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3540 gr.

16. september fingu Eva og Niclas Holm, Runavík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

16. september fingu Diana Solbjerg Mouritsen, Hoyvík, og Símun Jensen, Sandi, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2725 gr.

16. september fingu Durita Berthelsen og Fríði B. Nielsen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

17. september fingu Ruth og Jói Winther, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

# Harry Wilson 90 ár

Tað er tað spennandi við mínum núverandi arbeiði, at eg komi í samband við so nógv áhugaverd fólk.

Í fjør var eg biðin um at fáa eitt prát við Johannu f. Apol og Harry Wilson. Burtur úr hesum práti komu tríggjar Miðvikur við eini sera áhugaverdari frásøgn um ein bretskan hermann í Føroyum undir krígnum, sum fekk sær føroyska konu.

Vit hava havt samband síðan, og nú tey vóru aftur í Føroyum í summar fingu vit eitt prát saman. Tey eru bæði sera dámlig fólk og bæði duga væl at greiða frá.

Í dag verður Harry 90 ár, og tí verður høvið nýtt at senda honum eina heilsan.

Harry kemur frá eini arbeiðaraklassaumhvørvi. Hann er føddur og uppvaksin í býnum Bury norðanfyri Manchester í Lancashire. Bæði foreldrini arbeiddu á verksmiðju. Mamman byrjaði longu sum 11 ára gomul parttíðararbeiði á eini bummullsverksmiðju. So gekk hon eisini part av tíðini í skúla, og var hetta vanligt tá í tíðini. Pápi Harry, sum eisini æt Harry, var handverkari.

Eftir at vera farin úr skúlanum 14 ára gamal fór Harry at arbeiða sum skrivstovudrongur á einum arkitektavirki. Hetta gav honum áhuga fyri júst hesum øki, og hann byrjaði at ganga á kvøldskeið at lesa til arktitekt. Hetta varð tó avbrotið, tá ið hann sjálvboðin fór í herin í 1940.

Harry var í Frankaríki tíðliga undir krígnum í 1940. Hann var tá við at verða evakueraður, tá ið týski herurin trongdi bretska herin í Europa uppí ein krók, og herurin mátti flýggja um Ermasund. Tað vóru fleiri túsund hermenn eftir í Frankaríki eftir Dunkerque, og teir vóru evakueraðir frá Saint Nazaire í Bretagne á vesturstrond Fraklands tvær vikur seinni, beint áðrenn Frankaríki fall. Tá stóð nógv á.

Harry kom til Føroyar í 1943. Var fyrst í Sørvági og síðan 9 mánaðir í Havn.

Endin á krígnum gjørdist heilt øðrvísi enn Harry hevði roknað við. Hann hevði fingið gott eygað á eina føroyska gentu í Havn, men visti ikki rættuliga, hvussu hann kundi koma í samband við hana.

Við krígslok marsjeraðu allir ensku hermenninir gjøgnum býin í Havn. Tá tók júst hendan gentan myndir av skrúgonguni. Tá Harry sá hana taka myndir, tók hann kjansin, fór til hennara spurdi, um hann kundu fáa nakrar myndir frá henni. Jú, tað var so gaman í! Tey máttu so eisini hittast aftur, tá ið filmurin varð framkallaður, so Harry kundi fáa sínar myndir. Soleiðis komu tey at kennast og byrjaðu at koma saman.



*Johanna og Harry Wilson*

Aftaná kríggið varð Harry sendur til Italia . Italia var jú ein av taparunum í krígnum, og nú var tað ábyrgdin hjá teimum sameindu at tryggja, at landið kundi verða skipað aftur á einum fólkaræðisligum støði.

Har var Harry liðugur í juli 1946. Hjá Jóhonnu var einki at gera uttan at bíða í Føroyum. Í Italia vóru nógvar vakrar gentur, men hjartað lá eftir í Føroyum! Tey skrivaðu eisini saman hvørja viku.

Síðan fór Harry til Bretlands, og so er at koma aftur til Føroya til gentuna, sum bíðaði.

Besti møguleiki var at fara til Grimsby og so finna eitt føroyskt skip at fara heim við. Í Grimsby síggja teir nakrar mans í tuflum og hendur í lumma. Hetta mundu vera føroyingar, og so var. Harry spyr skiparan um hann kundi sleppa við til Føroyar, har hann skuldi fara eftir gentuni. Skiparin svarar aftur, at tað er eingin møguleiki fyri tí: "Tit eru farnir við okkara bestu gentum, so vit fara ikki at hjálpa tykkum at fara eftir teimum!" Tá tyktist einum av hinum synd í honum og einum øðrum, sum hevði sama ørindi. Hann bønaði skiparan um at lova teimum við kortini. Men hetta var sjálvsagt bert skemt. Skiparin var Esmar Fuglø, sum tá førdi Leiv Øssurson, sum var ein trolari á Tvøroyri.

### So til Bretlands

Johanna skuldi nú royna, um hon treivst í Bretlandi. Hetta var ikki nakar trupulleiki. Síðan fór hon til Hollands at vitja sína ætt har.

Harry fór seinni til Hollands aftaná henni. Tey giftust á borgmeistaraskrivstovuni í Haag 24. marts 1948. Aftaná fóru tey til ensku kirkjuna í býnum at fáa kirkjuligu vígsluna.

Tískil hava tey júst havt diamantbrúðleyp, og ynskt verður eisini tillukku við tí, hóast nakað seint.

Tey komu aftur til Onglands, og tá fór Harry aftur at lesa til arkitekt. Hann byrjaði at lesa áðrenn kríggið, men mátti so gevast, tá ið hann fór í herin.

Av hesi orsøk fekk hann eisini ein eyka almennan stuðul, tí hansara virkisleið jú varð avbrotin. Hann las so trý ár afturat og gjørdist liðugur sum arkitektur í 1950. Í eini seks ár var hann býararkitekur í Salford, sum liggur nærindis Manchester.

Aftaná fór Harry at arbeiða fyri stjórnina á Isle of Man, har tey búðu í fýra ár.

Frá Man komu tey so til Hull í 1959. Har var ikki so spennandi tá. Tað var framvegis nógv, sum ikki var bygt upp aftur eftir kríggið. Hull var so sera illa bumbaður undir krígnum. Hann var jú ein havnabýur og tí eitt mál hjá týskarum. Har doyðu ikki færri enn 1.200 fólk av krígsávum. Sjálvt danska kirkjan varð bumbað, men hon er síðan bygd upp aftur.

Harry fór at arbeiða hjá arkitektadeildini hjá býráðnum í Hull. Hetta var í ein tíð, tá ið Labour flokkurin hevði valdið í mongum býum, og flokkurin eisini vildi seta sín dám á býirnar. Labour var framburðssinnaður flokkur. Tí var eisini nógv bygt, eisini á tí sosiala økinum, sum skúlar, barnagarðar og ellisheim. Her var eisini framvegis nógv at byggja upp aftur eftir bumbingina undir krígnum.

Tey bæði hava verið virkin í donsku kirkjuni í 36 ár, har føroyingar eisini eru komnir.

Tey plaga eisini at fara til árligu minnisgudstænasturnar fyri danir og føroyingar, sum doyðu undir krígnum. Hesar eru í Newcastle á hvørjum ári fyrst í mai, umleið ársdagin fyri bardagalokið. Tey hava eisini verið við til føroyskt flaggdagshald á donsku sendistovuni í London.

### Hjálptu okkum í grundamálinum

Elsti sonur Johannu og Harry er Louis, uppkallaður eftir abbanum. Tá ið allur hesin ágangurin var ímóti føroysku hvalaveiðuni í Bretlandi var tað Louis, Helgi Joensen, ættaður í Gøtu, Marjun Joensen King, ættað úr Lorvík og Ólavur Rasmussen, sum tá var prestur í donsku kirkjuni, sum skipaðu fyri at fáa fram føroysku sjónarmiðini í Bretlandi.

Harry royndi eisini at hjálpa til við at hava lesarabrøv í bløðunum. Henda herferðin móti Føroyum hasaði eisini av.

Elsta dóttirin eitir Nordina. Hon býr í Hessle, sum er nærindis teimum. Hon byrjaði at starvast í eini skrivstovu. Síðan bleiv hon au pair genta í Danmark. Hon kom aftur og arbeiðir hjá svenskum frisøri í Hull.

Andrew er næstur. Hann las farmakologi í Cardiff og London. Hetta er læran um ávirkanina av heiluvági á kropp og sinn. Hann hevur eisini doktaraheiti á hesum øki og arbeiðir nú sum farmakologur á einum sjúkrahúsi í Blackburn.

Tann yngsta er Helen, sum býr í York i Norðuronglandi. Hon er útbúgvin lærari og er nú lærari í enskum fyri útlendingar.

Tey bæði eiga 6 barnabørn, so familjan er hampiliga stór.

Tað er eingin ivi um, at øll henda familjan hevur verið góð umboð fyri Føroyar, har tey hava verið. Tað er eisini ein fongur hjá einum landi sum okkara at hava slík fólk at tala okkara sak.

Tí fara undirritaði og Jan Müller at ynskja Harry og tykkum øllum hjartaliga tillukku við hesum stóra degi.

**ó.**